# Vísindavøkan á ferð –
# bílegg ein granskara!

Síðst í september fer Vísindavøka at vera kring alt landið. Í sambandi við Vísindavøkuna 2015 hava ein røð av granskarum játtað at halda fyrilestrar kring landið í vikuni upp undir Vísindavøkuna. Hetta er í døgunum 21. til og við 24. september. Endamálið er at geva øllum føroyingum møguleika at uppliva part av Vísindavøkuni. Fríggjadagin 25. september verður ein heilur dagur við framløgum, framsýningum og tiltøkum í iNOVA í Tórshavn.




Við hesum bjóða vit skúlum, stovnum, fyritøkum, feløgum, kirkjum, samkomum og øðrum **at bíleggja ein granskara** at koma at halda fyrilestur hjá sær ein av døgunum 21. – 24. september.
Tað kann bæði vera um dagin og um kvøldið.

Granskarin heldur ein fyrilestur um eitt avtalað evni í 30-45 minuttir og síðani er høvi til spurningar ella kjak.

Treytirnar eru einfaldar: Tann, sum tekur ímóti einum fyrilestrahaldara, skal lýsa við tiltakinum, eitt nú í telduposti til starvsfólk ella limir, á Facebook, við tíðindaskrivi ella lýsing í miðlunum. Tað skal vera ein uppvørpa á staðnum og mikrofon um neyðugt. Tað skal vera pláss fyri, at í minsta lagi 20 fólk kunnu koma til tiltakið. Granskararnir gera hetta sum part av sínum starvi og skulu ikki hava samsýning fyri fyrilesturin.

Avtalur verða gjørdar í tí raðfylgju, sum tað verður bílagt, so tey sum spyrja fyrst, hava fyrsta rætt. Tað ber væl til at biðja um fleiri fyrilestrar til sama stað, gjarna við eini raðfesting av, hvør fyrilestur ynsktur verður. Í fyrsta umfari tilskila vit okkum rætt til bert at játta ein fyrilestur til hvønn, sum bíleggur. Er rúm fyri tí, ber til at fáa fleiri.

Bíleggjast skal áðrenn 3. september á telduposti granskning@granskning.fo. Eftir hetta verður samlaða skráin almannakunngjørd á granskning.fo. Hon verður eisini prentað í Vísindavøkublaðnum, sum kemur í hvørt hús 16. september.

Granskararnir, sum hava játtað at halda fyrilestur, eru:

| | |
|---|---|
| Agnes Mols Mortensen<br>Fiskaaling: | Taraaling - frá spora til borðisk. |
| Anna Maria Fosaa<br>Søvn Landsins: | Hvussu ávirka vit menniskju plantuvøksturin í føroysku náttúruni. |
| Ari Johanneson<br>Jarðfeingi: | Elprísur og elektrifisering. |
| Ása Johannesen<br>Fiskaaling: | Persónsleiki hjá rognkelsum: Hvørji eta flest lýs. |

| | |
|---|---|
| Bjarti Thomsen<br>Jarðfeingi: | Vindur og orkugoymsla. |
| Erland Viberg Joensen<br>Søvn Landsins: | Føroyar traditión og modernitetur - uttanfyri og  partur av heimssamfelagnum. Við støði í tíðini eftir kríggið í 1945 til í dag – mentanar- og vinnulív, miðfyrisiting, kalda kríggið, altjóða sambond og stovnseting av vísinda- og vitanarstovnum. |
| Erland Viberg Joensen<br>Søvn Landsins: | Hvalastøðin við Áir miðskeiðis í 1960-árunum og í dag. Ein samleikandi ætlan at varðveita eitt ídnaðarminni. |
| Eydna í Homrum<br>Havstovan: | Norðhavssildin fyrr og nú. |
| Hannis Gislason<br>Fróðskaparsetrið: | Biostatistikkur, bioinformatikkur og teldulívfrøði. Úrslit og ætlanir innan aligransking, heilsugransking og greining av pelagiskum fiskastovnum. |
| Hans Andrias Sølvará<br>Fróðskaparsetrið: | Fólkaatkvøðan í 1946. |
| Hans Andrias Sølvará<br>Fróðskaparsetrið: | Frá sjálvstýri móti loysing. Radikaliseringin av tjóðskapar- og sjálvstýrisspurninginum. |
| Hans Andrias Sølvará<br>Fróðskaparsetrið: | Læknastríðið 1952-1956. |
| Heri Ziska<br>Jarðfeingi: | Oljuleiting á føroyskum øki, frá byrjan til í dag.... og frameftir. |
| Jákup Reinert Hansen<br>Fróðskaparsetrið: | Hin kristiligi barnalærdómurin – Katekismus-undirvísing í Føroyum. Við støði í 1700-talinum verður spurt, hvat børn og ung í Føroyum skuldu læra – og um tey so eisini dugdu tað. |
| Jan Arge Jacobsen<br>Havstovan: | Makrelur í føroysku vistskipanini. |
| Jan Sørensen<br>Søvn Landsins: | Djóralívskanningar sum amboð til at vísa á dálking. |
| Jana Ólavsdóttir<br>Jarðfeingi: | Tankar um, hvussu heitar keldur verða til í Føroyum. |
| Jóhannis Danielsen<br>Havstovan: | Kanningar av ferðing hjá- og dálking av lomviga, ritu, lunda, havhesti, likku, fiskimása og æðu. |
| Kári Mortensen<br>Jarðfeingi: | Virkisætlan. Framtíðar orkuskipan í Føroyum. |
| Kári Mortensen<br>Jarðfeingi: | Hvussu fáa vit veruliga gongd á elektrifisering av upphiting? |
| Kári Mortensen<br>Jarðfeingi: | Elektrifisering av ferðsluni á landi og útbygging av varandi orkuframleiðslu. |
| Katrin Hoydal<br>Umhvørvisstovan: | Hvat er sambandið millum kyksilvur, kol og hval? |
| Knud Simonsen<br>Fiskaaling: | Møguleikar fyri sjóvarfallsorku. |
| Knud Simonsen<br>Fiskaaling: | Rák á firðunum. |
| Kristianna Hammer<br>Fróðskaparsetrið: | Lýsing av vón. Kanning av kvinnum, ið nýliga hava fingið staðfest undirlívskrabba. |
| Lis Mortensen | Náttúruarvur, - hvørja náttúru lata vit eftirkomarum okkara? |

| | |
|---|---|
| Jarðfeingi: | |
| Maria Dam<br>Umhvørvisstovan: | Kanningar farnar í fisk. |
| Meinhard Eliasen<br>Jarðfeingi: | Frá torvi til jarðhita. |
| Óluva Eidesgaard<br>Jarðfeingi: | Tann dynamiska livandi jørðin í fleiri milliardir ár. |
| Pál Weihe<br>Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu: | Heilsuárin av dálkaðum mati úr havinum. |
| Símun V. Arge<br>Søvn Landsins: | Sandur í fornfrøðiligum ljósi - heimildarmeingi og avbjóðingar. |
| Turið Madsen<br>Jarðfeingi: | Hvussu vóru Føroyar fyri 50 milliónum árum síðan. |
| Turið Sigurðardóttir<br>Fróðskaparsetrið: | Kynssamleiki í føroyskum barna- og ungdómsbókum. |
| Zakaris Hansen<br>Fróðskaparsetrið: | Fjølbroytni í orðalag í føroyskum |

*Fyrivarni verður tikið fyri broytingum - annaðhvørt um onkur fær forfall ella um fleiri koma afturat.*